# MÓTAHEIMURIN

**Á Hvonn Live, sum var leygarkvøldið, var mótaheimurin viðgjørdur við einum føroyskum sjónarhorni. Bloggarar, altjóða modellir, sniðgevar, handilseigarar og onnur góvu sítt íkast og teknaðu tilsamans eina greiða mynd av mótaheiminum. Eisini danski satirikarin Anders Breinholt legði leiðina inn á Hvonn, og endað var við eini minimótasýning, har fjølbroytnið hjá føroyskum sniðgevum varð víst.**

Orð: Eydna Skaale Myndir: Álvur Haraldsen



*Anders Breinholt, sum er vertur á donsku sjónvarpssendingini Natholdet, stakk inn á gólvið á Hvonn til eitt stutt prát. Hann segði við einum smíli, at ein av fordómunum, hann hevði um Føroyar áðrenn hann kom higar, var, at vit hava heimsins vánaligasta veðurlag. Tann fordómin hevði hann fingið váttað nú. Hann var annars sera glaður og yvirraskaður av góðu móttøkuni, hann hevur fingið í Føroyum*

*Tóra Højgaard Joensen og Elin Christiansen, sum báðar eru mótabloggarar, greiddu frá um móta og blogging. Tær vóru samdar um, at hóast mótabloggarnir eru komnir fyri at vera, so fer tó altíð at vera tørvur á mótabløðum eisini.*








*Óluva Johannesen, sum hevur arbeitt sum model í fleiri ár, millum annað í New York, Milano og London, og Juanita Schrøter Holm, sum hevur arbeitt í London, greiddu frá um modellheimin. Serliga upplivingarnar hjá Óluvu vóru skakandi.*